Takk fyri innbjóðingina at koma oman í Løgtingið. Eg eri cand mag í norðurlendskum máli og bókmentum, serliga føroyskum og so í eisini sponskum. Eg havi sjálv onnur skrivað spanskt-føroyska skúlaorðabók. Hervið vil eg koma við mínum íkasti til at lýsa málið, tá føroyska alfabetið ella stavraðið varð skorið við 5 bókstavum í 2013. Eg havi verið vald tvær tær fyrstu seturnar í Málráðið av Málfelagnum, frá 2013 til 2021 og tí havi eg fylgt við málinum um stavraðið frá fyrstu parkett.

Ikki tykkum at siga so vóru tá 11 limir í Málráðnum og av teimum vórðu fimm vald í eina starvsnevnd, sum møttust oftari at viðgera mál, áðrenn tey vórðu løgd fyri samlaða málráðið. Tað vísti seg at ráðið deildi seg skjótt í ein meiriluta og ein minniluta, har eg sjálv var í. Ongin í minnilutanum fekk pláss í starvsnevndini, hóast vit stillaðu upp til tað, men vóru ikki vald.

Tað var breið semja millum okkara førandi málfrøðingar at eitt alfabet er ein praktiskur listi av bókstavum skipaðir í eina ávísa raðfylgju - eitt pedagogiskt amboð at brúka í tí dagliga og ikki ein málfrøðiligur spurningur, sum bara málfrøðingar, skulu taka støðu til. Nevnast kunnu Eivind Weihe, Hjalmar Petersen, Jeffri Hendriksen, Jógvan í Lon Jacobsen, professari.

Eitt slagorð hjá Málráðnum tá var: “Øll skulu kenna seg aftur í málinum” og “Øll eiga málið”.

Úrslitið av stríðnum um stavraðið tá, var at meirilutin í Málráðnum (8 fólk) útihýsti bókstavirnar c, q, w, z og x úr stavraðnum. Minnilutin, Eivind Weihe, Hjalmar Petersen og eg vildu eisini verða hoyrd, og tí tóku vit sjálvi stig til at geva  Mentamálaráðharranum, Bjørn Kalsø, okkara viðmæli um føroyskt stavrað við teimum 5 forfjónaðu bókstavunum og grundgóvu fyri tí.

Sum eitt úrslit av at teir 5 bókstavirnir blivu útihýstir úr alfabetinum, tók Málfelagið stig til at prenta 25.000 eintøk av Móðurmáls-alfabetinum, við tekningum hjá Óla P. og senda tað í hvørt hús í landinum. So nú høvdu vit tvey alfabet.

Føroyska málið tekur ikki skaða av at vit hava c, q, z, w og x í alfabetinum, heldur tvørturímóti. Tað er brúk fyri hesum bókstavunum. Vit brúka teir hvønn dag t.d. í støddfrøðini, tá vit arbeiða við y og x ásanum, í evnafrøðini, tá vit tosa CO2 og zink til dømis, í lívfrøðini, tá vit tosa um x-kromosomir, í læknafrøðini har málið er latín, í tónleiki, tá vit spæla creciendo í c-dur. Dømini eru óteljandi. Áhugavert er at nevna at svenska alfabetið ikki hevði w við áðrenn 2006, men at tað varð tikið við, tá tað bleiv vanligt at tosa um heimasíður við www.logting.fo td

Eg havi undirvíst 27 ár í Hoydølum og á Glasi og har er tað vanligt at uppgávur verða settar upp í punkt: a, b, c og so víðari. Prógvtøkuuppgávurnar hava typiskt ein a-spurning, b-spurning, c-spurning etc

Seinni árini hevur tað verið ein fastur táttur hjá Fólkaheilsuráðnum hvønn oktobermánaða at hava fokus á sálarheilsu, har tey vísa á vit eru partur av einum altjóða átaki, sum á føroyskum er umsett til "ABC fyri sálarheilsu". Act, Belong, Commit. Umsett til: Ver virkin, ver saman, ver hugbundin.

Tá vit tosa um fyrstuhjálp, brúka vit eisini eina altjóða meginreglu, ABC, fyri nær og hvussu vit skulu hjálpa skaddum fólki. Har a stendur fyri airways, b fyri breathing og c fyri circulation. Altso tey, sum ikki hava fría andaleið skulu hjálpast fyrst, síðani tey, sum ongan andadrátt hava og trið í røðini koma tey við blóðrensltrupulleikum. At hugsa um ABC-meginregluna í slíkari støðu kann bjarga lívum.

Í Føroyum eru millum 7 og 8000 føroyingar, sum hava antin fornavn ella eftirnavn stavað við forfjónaðu bókstavunum t.d. Max, Victoria, Christiansen, Zachariassen. Hvussu halda tit at eitt sjey ára gamalt barn hevur tað, tá tað í fyrsta flokki finnur út av at allir bókstavirnir í hansara ella hennara navni ikki eru við í stavraðnum? Skuffað og ikki serliga inkluderað, ha?

Vit tosa ikki um at at broyta stavsetingina ella skriftmálið ella seta eitt annað skriftmál inn, men bara um at verða inkluderandi. Í Rættskrivingarorðabókini stendur nær vit skulu brúka c, q, w, z og x. Meiningin er ikki at vit skulu fara at skriva Klaksvík við x, Miðvágur við w ella líknandi. Og tá vit taka nýggj orð inn í málið, skal eisini standa í Rættstavingarorðabókini, hvussu orðini skulu stavast.

Takk fyri!